## Ársins lið í Englandi funnið

Chelsea hava fýra leikarar á ársins liði í Onglandi, Manchester United og Arsenal hava tveir leikarar á liðnum hvør.

Ársins lið í Premier League sær sambært leikarafelagnum soleiðis út.

Petr Cech (Chelsea)
Gary Neville (Man Utd)
John Terry (Chelsea)
Rio Ferdinand (Man Utd)
Ashley Cole (Arsenal)
Shaun Wright-Phillips (Man City)
Steven Gerrard (Liverpool)
Frank Lampard (Chelsea)
Arjen Robben (Chelsea)
Thierry Henry (Arsenal)
Andy Johnson (C Palace)

-NuD

## John Terry besti leikari í Onglandi

Á samkomu sunnukvøldið varð kunngjørt at leikarar í Onglandi hava valt miðverjan og liðskiparan hjá Chelsea John Terry til ársins leikara.

Felagið hjá leikarunum skipar hvørt ár fyri PFA Player of the year atkvøðugreiðsluni. Í ár varð atkvøtt millum Chelsea leikararnar Petr Cech, Frank Lampard og John Terry, Arsenal framherjan Thierry Henry, Liverpool liðskiparan Steven Gerrard og Crystal Palace framherjan Andrew Johnson.

Í ár var tað 24 ára gamli Terry sum fekk heiðurin. Terry hevur havt eitt frálíkt ár. Har hann saman við liðfeløgunum hevur vunnið Liga Cup, er væl ávegis at tryggja sær enska meistaraheitið og mikudagin spælir móti Liverpool í hálvfinaluni í Champions League.

Manchester United framherjin Wayne Rooney vann heiðurin sum besti ungi leikari.

-NuD

## Barthez dømdur fyri at spýta

Franski málverjin Fabien Barthez er dømdur seks mánaða leikbann fyri at spýta á ein dómara.

Ekstrablaðið skrivar, at franska fótbóltssambandið avhoyrdi Barthez í gjár, og í dag varð støða tikin til, at kendi málverjin skal hava leikbann í seks mánaðir, harav helvtin er treytað.

Tað var í vinardystinum millum Wydad Casablanca úr Marokko og Olympique Marseille í februar, at Fabien Barthez spýtti á dómaran Abdellah El Achiri.

-hkm

## Mourinho: Eg haldi við Arsenal

Chelsea venjarin José Mourinho sigur, at hann heldur við Arsenal ímóti Tottenham mánakvøldið. Hóast ein sigur til Tottenham ger Chelsea til enskar meistarar.

Mourinho gerst alsamt løgnari, og nú ber av. Við www.chelseafc.com sigur venjarin. At hann vil vinna hvørja ferð, og veit at vinna Arsenal ikki mánakvøldið, verða Chelsea spælararnir ikki nóg uppsettir ímóti Bolton næsta vikuskiftið, og vinna tí kanska ikki. Tí vil hann, at Arsenal skulu kappast við um meistaraheitið longst møguligt.

-NuD

## Bowyer harðari dóm

Lee Bowyer og Kieron Dyer úr Newcastle ruku í krovið á hvørjum øðrum í dysti móti Aston Villa fyri nøkrum vikum síðani, og nú hevur Lee Bowyer fingið aðrar tríggjar dagar í leikbanni.

Ekstrablaðið skrivar, at enska fótbóltssambandið FA hevur gjørt av, at Lee Bowyer hevur ikki verið fótbóltinum at frama, heldur tvørturímóti, og umframt eitt trý daga leikbann skal Bowyer eisini rinda bót upp á 327.000 krónur.

Lee Bowyer hevur longu frammanundan fingið fýra daga leikbann, og hann hevur mist sína løn frá Newcastle í seks vikur, svarandi til 2,2 milliónur krónur.

-NuD

## Ferguson: Ruud fer ongan veg

Manchester United venjarin Sir Alex Ferguson sigur við Soccernet.com, at hann ongar ætlanir hevur um at selja tann besta framherjan í Evropa til Real Madrid

Tíðindi vóru annars frammi um at Manchester United og Real Madrid fóru at gera ein býtishandil. United fekk Michael Owen og Madrid fekk Ruud Van Nistelroy. Hetta verður sambært Ferguson av ongum.

-NuD±



*Joe Cole og Patrick Vieira í hornatøkum. Tá avtornaði, endaði alt, sum tað byrjaði, tá Chelsea og Arsenal brustu saman mikukvøldið í farnu viku*

*Mynd: Reuters*

# Vónbrot í oddabraki

**Oddadysturin millum Chelsea og Arsenal mikukvøldið gjørdist eitt vónbrot. Hvørki av liðunum megnaði at bróta ígjøgnum, og tí er munurin teirra millum framvegis ellivu stig. Manchester United fekk tveir leikarar riknar av vølli ímóti Everton, ið heldur óvæntað vann 1-0. Liverpool fekk eisini ein hart tiltrongdan sigur**

PREMIER LEAGUE

*Stefan í Skorini*
*stefan_skorini@hotmail.com*

Oddabrakið, sum øll hava bíðað eftir í longri tíð, bleiv ongantíð tann stóra fótbóltsupplivingin. Chelsea og Arsenal møttust mikukvøldið á Stamford Brigde, og tað endaði við málleysum javnleiki. Arsene Wenger hevði lagt sínum leikarum eina við, at teir ikki skuldu gevast uttan ein ordiligan bardaga, men tað eydnaðist ikki at basa oddaliðnum Chelsea.

Hagtølini góvu annars ikki Chelsea góðar vónir undan dystinum. Liðið hevur nevniliga ikki vunnið á Arsenal í landskappingini síðan 1995, tá Mark Hughes skoraði sigursmálið, og John Terry var bóltadrongur við síðulinjuna.

Arsenal hevði hvørki toppskjúttan í deildini, Thierry Henry, ella verjuleikaran Sol Campbell tøkar vegna skaða.

Dysturin var lívligur, og bæði liðini høvdu góðar málmøguleikar. Robert Pires rakti tvørtræið eftir bert trimum minuttum, og sami Pires bjargaði eisini á málstrikuni frá Gudjohnsen í fyrra hálvleiki. Chelsea hevur nú hildið málið reint í 23 landskappingardystum í ár, og tað er ájavnt við gamla metið, sum júst Arsenal eigur.

Mourinho segði í vikuni, at hann fegin vil avgera meistaraheitið sum skjótast, so at liðið kann konsentrera seg 100 % um hálvfinaluna í Champions League ímóti Liverpool, men teir bláu úr London mugu í øllum førum bíða tvey umfør enn.

Javnleikurin hevur við sær, at Chelsea ikki kann tryggja sær meistaraheitið komandi vikuskiftið, tá teir møta Fulham. Men við fimm dystum eftir og ellivu stigum á muni, er tað bert ein spurningur um tíð.

### United misti høvdið

Manchester United hevur tryggjað sær sæti í FA-Cup finaluni, men liðið má møguliga taka til takkar við einum triðja plássi í landskappingini.

United stillaði upp við sterkastu manning, sum var tøk, á útivølli ímóti Everton, ið harðliga hevur brúk fyri stigum fyri at røkka Champions League.

Everton megnaði at vinna 1-0 og liggur tí væl fyri at vinna sær sæti í meistarakappingini komandi ár. Tað var gamli málrevurin Duncan Ferguson, ið skoraði einasta málið í dystinum tíggju minuttir inn í seinna hálvleik.

Eftir hetta royndi Manchester United at leggja trýst á heimaliðið, men tá Gary Neville fekk reytt kort miðskeiðis í seinna hálvleiki fyri at sparka bóltin eftir áskoðarunum hjá Everton, var torført hjá teimum at fáa útjavnandi málið.

Í seinasta minutti fekk eisini Paul Scholes reytt kort fyri at gera seg inn á Tim Cahill, og so endaði United við bert níggju monnum. Ósigurin hevur við sær, at United nú er fýra stig aftanfyri Arsenal á øðrum plássi.

### Liverpool kærkomnan sigur

Liverpool var á útivølli ímóti Portsmouth, og ein sigur var eitt ófrávíkiligt krav, um teir skulu gera sær vónir um Champions League komandi ár.

Venjarin hevði heldur óvæntað sett Steven Gerrard, ið brendi brotsspark ímóti Tottenham leygardagin, á bonkin, men tað vísti seg at vera ein skilagóð avgerð, tí Liverpool vann dystin.

Fernando Morientes legði Liverpool framum eftir bert fýra minuttum, tá hann skoraði í aðru atløgu eftir innlegg frá Riise. Hálvan tíma seinni javnaði Diomansy Kamara.

Liverpool hevur klárað seg sera illa á útivølli í ár, men hesuferð gekst betur í hond. Luiz Garcia skoraði sigursmálið beint fyri steðgin. Liverpool fór tí framum Bolton uppá fimta pláss, tó framvegis trý stig aftanfyri Everton, ið eisini hevur ein dyst til góðar.

Bolton leikti týskvøldið 1-1 á heimavølli ímóti botnliðnum Southampton. Stelios Giannakopoulos legði Bolton framum men Kevin Phillips javnaði í seinna hálvleiki. Bolton megnaði tí ikki at elta Everton á fjórða plássi.

### Norwich gjørdi ein vørr

Fyri hálvari aðru viku síðani vann Norwich á heimavølli ímóti Manchester United. Mikukvøldið var Newcastle á skránni, og botnliðið endurtók bragdið. Hesuferð við einum 2-1 sigri.

Youssef Safri hevði lagt heimaliðið á odda miðskeiðis í seinna hálvleiki við einum langskot, men Patrick Kluivert javnaði, tá teir níti minuttirnir vóru farnir.

Norwich, ið hevur liðið aftast seinastu mánaðirnar, gavst tó ikki so, og dýrasti spælari felagsins, Dean Ashton, fekk sigursmálið í allar seinasta álopinum. Norwich er nú bert tvey stig frá niðurflyting, og tað sær út til at blíva ein beinharður dystur um plássini í bestu deildini.

Eitt annað botnlið megnaði at fáa eitt stig við sær aftur av White Hart Lane, har Tottenham tók ímóti West Bromwich Albion. Gestirnir komu tó framum í fyrra hálvleiki við máli frá Zoltan Gera. Robbie Keane hevur innstillað kanónina aftur, og hann fekk útjavnandi málið í seinna hálvleiki.

Blackburn sigraði á Crystal Palace. Norðmaðurin Morten Gamst Pedersen fekk einasta málið í dystinum, og Blackburn hevur við hesum sigrinum so at siga tryggjað sær sæti í bestu deildini.

Aðrir meira týdningsleysir dystir hetta umfarið vóru millum Aston Villa og Charlton, ið leiktu málleysan javnleik, og Manchester City og Birmingham, har City vann 3-0. Middlesbrough og Fulham spældu javnleik 1-1 týskvøldið.